DAGSINS MEINING

Stoltenberg-málið – eitt margháttligt mál

Søgan um, at viðurkendi fyrrverandi norski politikarin, Thorvald Stoltenberg, skuldi koma Norðuratlantsbólkinum á fólkatingi til hjálpar í hernaðarmálum, fekk eina løgna vend.

Tað var tann 18. mars, at Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi sendi út tíðindaskriv um, at Thorvald Stoltenberg skuldi vera formaður í bólkinum, sum skuldi kanna hernaðarmálið. Tann 6. apríl kundi Sosialurin avdúka, at Thorvald Stoltenberg stutt eftir hevði tikið seg úr bólkinum. Í kjalarvørrinum á hesum spurdu vit fólkatingsmannin hjá Tjóðveldisflokkinum, hví hann ikki eisini hevði borið føroysku fjølmiðlunum hesi tíðindi. Hann segði, at talan var um eitt mistak.

Burtur úr hesum práti við fólkatingsmannin fingu vit so allar konspiratiónsteoriirnar hjá honum um, at »danska uttanríkisráðið gjøgnum donsku sendistovuna í Oslo hevur lagt trýst á Thorvald Stoltenberg um at taka seg úr bólkinum«, og »at Javnaðarflokkurin í Føroyum kanska eisini var innblandaður«.

Tá hesi tíðindi verða avsannað ávikavist úr uttanríkisráðnum og frá Javnaðarflokkinum, hevði hetta sjálvsagt almennan áhuga.

Í Dimmalætting leygardagin kemur fólkatingsmaður Tjóðveldisfloksins við einum av sínum vælkendu álopum á Sosialin, soleiðis sum vit eisini upplívdu tað, tá hann kallaði Anfinn Kallsberg, løgmann, fyri »danskan leigusvein«, ella tá hann sum landsstýrismaður tveitti danskan lærara á dyr í Mentamálastýrinum. Fyrru ferðina varð Tórbjørn Jacobsen alment avdúkaður fyri at lúgva, tá hann skuldsetti Sosialin fyri at hava uppfunnið søguna. Seinnu ferðina mátti hann leggja frá sær sum landsstýrismaður.

Í brævi til fjølmiðlarnar í dag rør fólkatingsmaðurin uppundir, at Sosialurin skal hava brotið eina avtalu um, at hann skuldi sleppa at góðkenna greinina, sum stóð í blaðnum fríggjadagin. Blaðmaðurin játtaði honum – sjálvandi – at hann skuldi sleppa at lesa greinina, og hann fekk samstundis at vita, at hann kundi rætta faktuellar feilir. Tað er ikki uppgávan hjá keldunum at redigera greinir. Fólkatingsmaðurin fekk eisini at vita, at evstamark var kl 12.

Tá blaðmaður okkara einki frætti fyri kl 12, var hann í góðari trúgv, og greinin fór í blaðið. Tórbjørn Jacobsen hevur eftir øllum at døma onga viðmerking til skuldsetingarmar móti danska uttanríkisráðnum og Javnaðarflokkinum – hann nevnir einki um, at Sosialurin ber ósonn tíðindi. Hann sigur bara, at hann ikki vildi hava greinina í blaðið.

Hvat Sosialurin skal biða um umbering fyri, er ilt at skilja. Insinuerar fólkatingsmaðurin, at vit hava funnið upp á orðini um donsku sendistovuna í Oslo og danska uttanríkisráðið? Ella er tað ikki bara søgan sum endurtekur seg, eins og ta ferðina, hann kallaði løgmann danskan leigusvein og ikki var maður fyri at standa við síni orð…

Sosialurin

VALGREINAR

Hevur nakar álit á Fólkaflokkinum?

Finnur Jensen
valevni hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymoy

Flokkurin hevur næstan líka nógvar meiningar, sum hann hevur limir. Á tíðindafundi verður sagt, at flokkurin útsetir fullveldisspurningin í 4 ár, meðan ex-borgarstjórin í Havn biðjur í tjóðveldisblaðnum fólki um at stuðla fullveldisgongdini. Tað hongur ikki saman!!

Flokkurin tosar um skattalætta, meðan sannleikin er tann, at lønirnar ongantíð hava verið so høgar sum júst nú, umframt at almenni sektorurin ongantíð hevur verið so stórur sum nú.

Hvat hevur fólkaflokkurin í veruleikanum at gera á politiska pallinum í løtuni?

Ungdómur og útbúgving

Hans Jacob Hermansen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi

Okkara ungdómur er tað dýrasta, vit eiga. Kortini geva vit honum bara eitt lítið sindur av tí, honum tørvar, so at hann kann skapa sær eina trygga framtíð í einum góðum fólkaræði.

Fleiri ferðir hava vit lænt føroyska skúlaverkinum útlendskar lógir og fyriskipanir og roynt at lagað tær til føroysk viðurskifti. Á pappírinum hevur hetta tikið seg væl út, men vit duga eftir øllum at døma ikki at rokna út fylgjurnar av hesum. Fleiri dømi eru um, at peningur er ikki settur av til tað, sum andin í lógini leggur upp til. Hetta er at halda skúlan fyri gjøldur.

Sjálvstýrisflokkurin fer saman við teimum, sum dagliga starvast innan skúlaverkið, at royna at loysa henda trupulleika. Tað snýr seg ikki bara um pening, men eisini um gevandi samstarv og virðing fyri hvør øðrum. Vit skulu smíða føroyskar lógir til føroyingar, men við framhaldandi lestri uttanlands fyri eyga.

Eitt sunt fólkaræði við skúlaðum fólki, bæði á sjógvi og landi, borgar fyri tryggari framtíð fyri Føroyar.

Setið ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á Føroya Løgting, tí svíkur miðjan, nytta endarnir einki!

Hvør samgonga verður eftir valið

Sverre Midjord
Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Hvørjir samgongumøguleikar verða aftaná valið, tað avgerð tú sum veljari. Tað kann verða torført at meta um, hvat tænur okkara samfelag best, og harvið hvørjum einstøkum borgara, avgerðin er tín. Floksformaður sambandsfloksins var í sjónvarpinum og segði soleiðis:

Vit eru fegnir yvir veljarakanningina, hon gevur okkum møguleikar. Vit byggja uppá ríkisfelagsskapin og fara í samgongu við teir flokkar, sum standa inni fyri hesum, og so helt hon fram, at higartil er tað bara javnaðarflokkurin, sum hevur somu støðu sum vit, men so skoytti hon uppí, at møguleiki er eisini við fólkaflokkin, men enn vita vit ikki hvar teir standa, og her góði veljari, er tað vandin er, um ikki ein sterkur javnaðarflokkur kemur til valið. Tí er tað avgerðandi hvat tit veljarar í Suðuroy gera. Møguleikin er eisini saman við fólkaflokkinum, tað er greitt, at um sambandsflokkurin fær møguleikan at mynda eina borgarliga stjórn, so ger hann tað, ríkisfelagsskapur ella ikki.

Her er vandi á ferð, tí um ein borgarlig stjórn tekur yvir í Tinganesi aftaná fullveldis stýrið, sum vit hava havt, so verður ein meiri miðstaðarpolitikkur førdur, har meira verður lagt til miðstaðarøkið og serliga Suðuroyggin verður við sviðið so. Les bert greinarnar, serliga frá sambandsvalevnunum í Tórshavn, teir breiða seg út og málið er bert eitt, tað skal meira leggjast í Tórshavn. Teir hava ongan áhuga fyri hvat gongur fyri seg uttan fyri teirra øki, tað skal vera greitt fyri okkum sum búgva í Suðuroy, at ein atkvøða til hesar flokkar í Suðuroy, er ein atkvøða til at styrkja miðstaðarøkið, og prísin kemur SUÐUROY at gjalda.

Avgerðin er tín, tí fari eg at heita á teg, sum avgerðina hevur í hondum. Verj Suðuroy, vel teir, sum stiðja tiltøk, sum eru okkum at gagni, vel umboð sum vilja framburð og trivnað, tí atkvøða avgerð hvør samgonga verður eftir valið.

Vel tryggleikan, vel Javnaðarflokkin.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VALGREINAR

Hvør byggir ikki land - rættleiðing

Jaspur Vang
valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Í valstríðnum hoyra og síggja vit javnan, at ávísir politikarar føra fram at nú skulu føroyingar taka ábyrgd, hava áræði, byggja land, seta fót undir egið borð og so framvegis.

Tað tykist, sum um talan er um nýggj fyribrigdi í hugaheiminum hjá hesum politikarum, og loyvi eg mær tí at koma við hesari rættleiðing.

Veruleikin

Talan er als ikki um nýggj fyribrigdi - tí í ríkisfelagsskapi, við ábyrgd og áræði, bygdu okkara forfedrar land og settu fót undir egið borð.

Úrslitið er, at vit í dag búgva í einum av heimsins frælsastu, tryggastu og mest framkomnu vælferðarsamfeløgum.

Skuldi nakar ivast, so byggja føroyingar framvegis við áræði, ábyrgdarkenslu og í ríkisfelagsskapi dagliga land og seta fót undir egið borð. Tað verður gjørt bæði á sjógvi og landi. Soleiðis er tað m.a. eydnast at endurreisa samfelagið, sum av ábyrgdarleysum politikarum var koyrt á heysin fyri einsans fáum árum síðani.

Tey, sum halda seg hava uppfunnið nýggj fyribrigdi, kunnu tí bert tosa egna vegna.

Skuldi tað verið so, at ávísir politikarar, sjálvt um teir vita betur, royna at sannføra fjøldina um, at føroyingar hava verið og eru ábyrgdarleysir, ósjálvstøðugir, ófrælsir og uttan sjálvsvirðing, er talan í roynd og veru um at endurtaka eini undirlutakend ósannindi so ofta, at onkur at enda møguliga trýr teimum.

Hetta trúgvi eg to ikki fer at eydnast, tí føroyska fjøldin er væl upplýst.

Framtíðin

Út frá tí málsetningi, at vælferðarsamfelagið ikki er okkara, men at vit einans hava tað til láns frá komandi ættarliðum, skulu vit tí framvegis í ríkisfelagsskapi við áræði vísa ábyrgd, og við skynsemi og skilvísi byggja land.

Umleið 2800 milliónir var tað sum bleiv brúkt av blokkinum av sitandi samgongu 1998-2002!!!

Johan Dahl
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy



Sitandi samgonga hevur næstan dagliga reypað av, hvussu lítið teir hava brúkt av blokkstuðlinum.

Tjóveldismenn pástanda, at einans lítil partur er bruktur - umleið 300 mill. Pr. ár.

Einhvør, sum dugir at leggja saman og trekkja frá, sær at onki skil er hesum pástandi teirra.

Tað næsta teir tosað um er sjálvberandi búskap - hetta er vorðið eitt eftirhondini forpoppað orð í føroyskum politikki.

Tað er bert tvinnir vegir at fáa sjálvberandi búskap uppá, nevniliga:

1)At vit kunnu økja inntøkurnar hjá vinnuni so hon kann bera niðurskurðin í blokkinum og harvið áhaldandi bera vælferðarsamfelagið Føroyar
Hin kosturin í at velja er ikki so stuttligur tí tað er:
2)Sparingar = (niðursett livistøði)- um ikki skattir og avgjøld skulu hækkað aftur, og tað vil eingin av okkum hava.

Um ikki tað eydnast at økja inntøkurnar hjá fiskivinnu og alivinnuni og hjávinnum teirra munandi , - so er alternativ tvey einasti útvegur !!!

Nevnast kann at yvirskotið hjá allari fiskivinnuni 2001 var uml. 250 millonir krónur

Blokknið urskurðurin var 366 milliónir krónir, - Tvs. Um allur vinningurin bleiv tikin frá fiskivinnuni, - so skal vinnan, - bara fyri at erstattað niðurskurðin í blokkinum hava minst 116 mio kronur afturat teimum 250 mio krónunum meir í inntøku.

Hetta sigi eg bert fyri at lýsa, hvat skal til fyri at seta ístaðin fyri niðurskurðin.

Ein skal eisini hava í hugað, at hesin vinningur er skaptur í eini tíð við fiskaprísum, sum ikki eru sæddir í Føroyum nakrantíð fyrr.

Sambandsflokkurin vil ikki verða við til, at vælferðin skal setast í vanda, men vit vilja verja borg og tryggja øllum føroyingum eitt framhaldandi trygt samfelag fyri øll at livað í , - ikki einans tey fáu.

Ein atkvøða til Sambandsflokkin tann 30. april er væl givin út - hon borgar fyri tryggum viðurskiftum her á landi fyri ung sum eldri.

Vel samband ella loysing og tú fært hvørki

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður
Fólkafloksins

Heimastýrisflokkanir avnokta heimastýrislógina, meðan Tjóðveldið noktar at arbeiða eftir nøkrum øðrum enn heimastýrislógini. Allir eru nú komnir beint á kós Fólkafloksins.

Tað er markháttligt at síggja hvussu flokkarnir á Løgtingi eru broyttir, har allir boða mest sum sama politikk og tó klára at fáa tað at síggja út sum ovurstórur munur er á.

Sambandsvalevni tosa um frælsi, meðan tjóðveldisvalevni tosa um samband við onnur.

Heimastýrisflokkarnir, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum fyrr hava hálovað heimastýrislógini, avnokta nú heimastýrislógina og ynskja aðra skipan. Henda nýggja skipan skal gera, at vit kunnu yvirtaka øll málsøki uttan tey, ið hava beinleiðis við suverenitet at gera, og at Løgtingið skal hava evsta vald á øllum yvirtiknum málsøkjum, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Eisini siga teir, at har vit skulu valda skulu vit gjalda. Við hesi skipan ynskja Sambands- og Javnaðarflokkurin í einum áramáli at yvirtaka øll málsøki. Treytin er at vit eru før fyri tí.

Tjóðveldisflokkurin sigur júst tað sama, men teir nokta at gera hetta við nakrari aðrari lóg enn heimastýrislógini. Lógin, sum hesin flokkur bleiv stovnsettur til at mótmæla.

Tað stuttliga

Tað stuttliga er, at tað sum flokkanir nú siga, er júst tað sama sum Fólkaflokkurin altíð hevur sagt. Hetta er sum tikið úr stevnuskrá Fólkafloksins og sum er endurtikið í valskrá floksins.

Munurin millum flokkarnar liggur eini 10-15 ár frammí í tíðini, tvs. tá øll málsøkið eru yvirtikin. Til tað tíð siga Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, at teir nokta at spyrja fólkið, um tey ynskja at verða sjálvstøðug. So ódemokratiskur er Fólkaflokkurin ikki. Tá ynskja vit at spyra fólkið, um tey ynskja suverenitet. Tað er jú bara fólkið, sum kann taka yvir Føroya land.

Fólkið skal nú seta saman eitt Løgting at ráða fyri borgum næstu fýra árini. Fyri hesi ár ætla allir flokkar at yvirtaka málsøki.

Tað má tí standa einum og hvørjum greitt, at tey sum við hetta valið ætla at velja samband við Sambandsflokkinum fáa tað ikki, meðan tey sum við atkvøðu til Tjóðveldisflokkin vænta loysing fáa tað heldur ikki. Kósin hjá øllum flokkum er løgd og hon er fólkaflokskósin, tí velja vit Fólkaflokkin.

Tingini, ið koma av sær sjálvum

(Aftursvar til Thomas Arabo)

Ivan Eginsson Moskalenko

Tað var við stórum áhuga, at eg havi lisið viðmerkingina hjá Thomasi Arabo til grein mína viðvíkjandi ferðavinnuni. Viðgangast skal, tað er als ikki ólogiskt, at Thomas nevnir ein av stóru ferðavinnumiðdeplunum í Evropa, ið ikki er fullveldi - nevniliga Kanaroyggjarnar (umframt Bermuda og Hawaii). Men so er tað vert at hugsa eitt sindur um, hvat er tað fyri slag av ferðandi, ið fer tann vegin (fleiri føroyingar hava ivaleyst verið har eisini). Endamálið í ferð teirra er at leggja seg á eina stróND við einum ísi í hondini og fáa brennandi sól oman á hálvnakna kroppin. Hjá teimum er líkamikið, um Kanaroyggjarnar ella Bermuda eru nøkur sum helst tjóð, og tað eru hesar oyggjarnar nevniliga yvirhøvur ikki. Tað er ikki tílíka slagið av ferðafólki, ið vit hava brúk fyri. Sum eg nevndi í fyrru greinini, so eiga Føroyar at nýta fyrst og fremst Ísland, sum fyrimynd á ferðavinnuøkinum. Bæði londini líkjast nógv, bæði so og so. Ísland kenna allir evropearar, Føroyar kenna fáir. Ísland er eitt ríki, Føroyar eru ikki. Og tað nyttar ikki at koma við grundgeving, at Ísland er størri enn Føroyar. Fullveldini San Marino og Liktinstein eru so nógv minni enn Føroyar, men hetta er á ongan hátt nøkur forðing hjá teimum flestu í Evropa at vita um tey og fáa áhuga fyri at vitja har!

Rætt hevur Thomas, tað eru kanska ikki nógv í heimsparti okkara, ið kenna tey fjarskotnu Nauru, Tuvalu og Vanuatu. Men tað eru verri enn so øll á hesum sovandi oyggjunum, ið liggja burtur í Stillahavinum, sum hava hoyrt um t.d. Danmørkina. Tað eru avgjørt ikki tey, ið vit skulu satsa uppá. Ísland og Føroyar liggja á vegamóti millum Evropa og Norðuramerika, og tað eru fyrst og fremst evropearar og amerikanarar, umframt japanarar, ið hava ráð til at ferðast. Tað eru júst tey, ið koma til Íslands í hópatali fyri at uppliva nøkru nattúruna og lata pengar eftir sær – fyri bussferðir, leigubilar, ferðaleiðarar, minnislutir, gistingarhús og s.v. At koma til Føroya hjá flestum av slíkum "globetrotterum" er púrasta óvið-komandi í dag. Tað var líka óviðkomandi t.d. at savna føroysk frímerki, áðrenn farið varð í holt við at framleiða tey, ella at halda við føroyska landsliðnum, áðrenn tað bleiv ein sjálvstøðug eind á altjóða pallinum. Við fullveldinum verður áhugi útlendinga fyri landinum, sum einum stati, skaptur. Eg havi fyri kortum verið í Estlandi og Slovenia, og tað er ein rísastórur minur á hagtølum viðvíkjandi útlendingum, ið kendu nakað til hesi bæði londini og vitjaðu har - áðrenn og eftir fullveldistøkuna. Ferðavinnan er í blóma har!

Thomas skrivar, at einki kemur av sær sjálvum. Men veruleikin er tann, at nógv ting nevniliga henda av sær sjálvum – at siga beinanvegin - saman við fullveldinum (t.d. sjálvstøðuga føroyska luttøkan í Evropeisku Grand-Prix tónleikakappingini, luttøkan í OL, fyri ikki at nevna fullan limaskap í ST, NATO, áltjóða hvalaveiðunevndini og s.v.). Sum støðan er í dag, so eru íslendingar, tann nærmasta grannatjóð Føroya, við felagsupprúna og líknandi søgu, - íslendingar bæði heima og úti í verðini, meðan føroyingar eru - sæð við útlendskum eygum – danir. Fullveldistøkan broytir hesa fatanina av Føroyum í verðini í eitt sekund. Tá gerast føroyingar tann minsta evropeiska tjóðin við sínum máli, mentan og samleika, ið nakrantíð hevur havt fult sjálvraði í sínum egna landi! Og tá fáa flestir evropearar at vita um Føroyar – tá, men ikki fyrr!